## DAGSINS MEINING

# Ein góð avgerð

Fríggjakvøldið í síðstu viku fingu Ólavur Hátun og Hanus Kamban ávikavist heiðursgávu landsins og mentanarvirðisløn landsins. Tað er ein nevnd, sum stillar inn til landsstýrismannin í mentanarmálum, hvør, ið skal hava hesar virðislønir. Eitthvørt mentað samfelag sær til at heiðra síni skapandi og útinnandi listafólk. Í nógv ár hevur býráðið í Havn havt mentanarvirðisløn og barnabókavirðsløn M.A Jakobsens. Hesar virðislønir, ið er nevndar eftir einum av mæstastu synum býarins, tæna Tórshavnar býi til æru.

So fingu vit fyri nøkrum árum mentanarvirðisløn landsins og heiðursgavu landsins, sum eru landsstýrisins virðislønir. Hetta var eitt frálíkt tiltak og eitt gott dømi um tann virkna mentanarpolitikk, sum varð rikin undir fullveldislandsstýrinum. Hesar virðislønir eru komnar fyri at vera og tað er púra óhugsandi, at eitt landsstýri í dag kundi funnið uppá at spart hesar virðislønir burtur. Umfram hesar virðislønir hava vit eisini eina barnabókavirðsløn útnorðurs, sum verður latin annað hvørt ár. Hendan heiðursløn er bert latin tvær ferðir, og er hon báðar ferðir farin til Íslands. Landið átti eins og okkara grannalond at havt fleiri heiðurslønir t.d. innan barnamentan, fjølmiðlar, umhvørvi o.m.a.

Tað var ein sera góð avgerð, ið innstillingarnevndin tók, tá hon gjørdi av at innstilla Hanus Kamban og Ólav Hátun til virðisløn og heiðursgávu. Hanus er kendur sum rithøvundur til bæði fagrar bókmentir við stuttsøgum og týðingum og til yrkisbókmentir, har hansara bøkur um J.H.O. Djurhuus skara framúr. Hanus er eisini samfelagsdebattørur og hevur ongantíð aftrað seg við at ganga ímóti streyminum, uttan mun til, um hesin rak frá høgru ella vinstru - ella talan var um eina íðu, sum mól í klingur í miðjuni. Hann fylgir síni sannføring uttan mun til kostnaðin. Hann er ein av okkara fáu veruligu europearum og sum góður europeari er hann rótfestur í gamlari heimligari mentan. Jørðildið er føroyskt - univers hansara internationalt. Hann hevur ein framúrskarandi, léttan og lærdan penn, er djúpt seriøsur og tilvitandi um ta ábyrgd, ið liggur á herðunum á einum intellektuellum í dagsins fjøltáttaða og fløkta samfelag, har nógv tjóðskapar-politisk, mentanarpolitisk og vinnupolitisk áhugamál dagliga bresta saman og renna saman. Eitt sera gott val til mentanarvirðisløn landsins.

Ólavur Hátun er eldsálin burturav í føroyskum tónleikalívi. Við sera góðum musikalskum gávum og hartil sera væl útbúgving innan sítt fak, tónleikin, hevur hann alt sítt vaksna lív stríðst fyri at menna og hækka støðið innan føroyskt tónleikalív. Í nærum hálva øld hevur Ólavur Hátun stríðst fyri hesum máli at hækka støðið, serstakliga innan kórsangin. Hann hevur virkað sum tónlistalærari í Føroya Læraraskúla, hann hevur verið stjóri fyri musikkskúlakipanini, organistur og framum alt hevur hann verið kórleiðarin. Sum kórleiðari hevur hann ríkað føroyskt tónlistalív og givið almenningum ógloymandi løtur. Eisini Ólavur er kendur fyri at kunna ganga ímóti rákinum og sum ein, ið hevur mót til sínar meiningar. Eitt sera gott val til heiðursgávu landsins. Samantikið má avgerðin hjá nevndini um at innstilla Hanus og Ólav til hesar báðar tignarligu virðislønir sigast at vera ein góð avgerð, sum hevur breiða undirtøku millum manna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvar eru Føroyar - í einum styrktum, alsamt vaksandi, sameindum Evropa

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



**Íslandsavtalan**
Eftir at hava sitið í seinastu viku á evnisdegi um ein nýggjan fríhandilssáttmála við Island, sum eftir míni fatan ikki gevur Føroyum neyðugu "fríhandilsligu" karmarnir at virka undir, men hinvegin gevur íslendskari vinnu frítt slag , tí hendan er nógv meira fjøltáttað enn okkara. Hetta tí vit - enn - einans hava fiskivinnuúrdráttir at útflyta og liva av, og tískil er tað hendan sum skal hava bestu marknaðartgongd. Eins og vit eisini eiga at fáa atgongd til at keypa rávøru frá londum sum Íslandi.

Hendan avtalan gevur okkum ikki hesar møguleikar, tí í upplegginum til avtalu heldur Ísland áhaldandi fram við at hava restriktiva atgongd til teirra fiskivinnu. Bæði á sjógvi á landið.

Sjálvandi skulu vit hava gott samband og samstarv við brøðratjóð okkara, men… Eg meti at vit hyggja skeivan veg - vit mugu hyggja meir móti Evropa og samstarvinum tann vegin.

**ES- ráðstevnan hvar bleiv hon av?**
Tosað hevur verið um at Løgmansskrivstovan skal skipa fyri eini ráðstevnu, sum skal kunna um tættari samstarv við EVROPA og møguleikarir í slíkum. Men enn er so onki hent, og vil eg mæla til, at vit skjótast fáa skipað fyri eini ráðstevnu, sum kann lýsað okkum fyrimunir og vansar við ES-samstarvið og møguligum ES-limaskapi og, hvussu Føroyar best kann mennast í slíkum samstarvið.

Fortreytirnar í samvinnu okkara við útheimin broytast støðugt, og tær stóru búskaparligu og handilspolitisku broytingarnar í londunum rundanum okkum seta føroyskum vinnulívi nýggjar og størri avbjóðingar.

Hendan gongin er partvís eitt úrslit av, at samansjóðingin i ES er víðkað, til at fevna um fleiri samfelagsøki og lond, so nú telist íbúgvaratalið í ES uml. 480 milliónir íbúgvar.

Sum eg havi nevnt í undanfarnum greinum um ES, so hava m.a. londini í Mið- og Eysturevropa, til tey gerast limir, gjørt samvinnuavtalur, sum bera í sær, at tey koma nærri ES búskaparliga og politiskt.

Hesar avtalur hava innliman sum mál uppá sikt. Vit mugu veruliga byrja at endurskoða okkara skipanir og hvat vit veruliga vilja í framtíðini, tí ES - tokið koyrir við fullari ferð, meðan vit standa á jarnbreytartøðini og bíða eftir tí "ongantíð komandi næsta tokinum " og harvið verða jarlagdir bæði vinnuliga og menningarliga.

Hyggið bert at Svøríki og Danmark. Hesi nærmastu grannalond okkara koma í næstu framtíð at brúka hópin av milliardum fyri at tryggja áhaldandi kappingarføri, útbúgvingarstøði og vinnuligir karmar.

**Noreg og Ísland - EBS avtalu við ES**
Noreg og Íslands hava t.d. við teirra EBS/EØS (Evropeiska Búskaparliga Samstarvi) avtalu fingið nógv tættari samvinnu við ES á nógvun týðandi økjum, og væntast kann, at báðir hesir grannar okra verða limir í ES innan heilt fá ár - ivaleyst 2-3 ár frá nú.

Hyggja vit eftir Íslandi so eru bankar og vinnulív aktivt farin inn við strategiskum íløgum bæði í Føroyum og runt í Evropa og eystanlondum, -málrættaðir og við einari miðvísari ætlan um at gera seg galdandi í framtíðini.

Hvat gera vit - jú, - vit sova víðari.

**Hvar eru Føroyar staddar í hesum høpi?**
Vit er uttanfyri meginrákið í Evropeiska samstarvinum.

Vit eru, sum eg havi nevnt fyrr, hvørki við í EFTA ella EBS samstarvinum, og er hetta heldur ikki nøkur loysn nú, tí tíðin er um at fara frá hesum felagskapum.

Í verandi støðu eru okkara viðurskifti við ES skipað í eini handilsavtalu og eini fiskiveiðuavtalu.

Fyri onnur øki eru ongar avtalur millum Føroyar og ES.

**Vit** eru eftirbátur í handilspolitisku samansjóðingini í Evropa.

Tann handilsavtalan, sum vit hava í løtuni, **hevur alt ov trongar karmar viðv. samskifti við ES**, og møguleikarnir fyri gagnligari marknaðartilgongd í galdandi avtalu eru avmarkaðir og ivaleyst fulltroyttir, og hon kemur ikki í longdini at nøkta tørvin hjá vinnuni.

Seinast hava vit nú frætt, at tann PAN Europeiska avtalan, sum eftir ætlan skuldi setast í verk tann 1 januar 2005, og sum skapar okkum nakað rúmari ræsur, enn vit hava havt, er útsett í fyrsta umfarið til 1.marts, og er hetta sera óheppið fyri okkara vinnu.

**Betran av kappingarførinum og Marknaðaratgongdin í framtíðini er alt avgerandi fyri vinnulívið og eksistensgrundarlag okkara.**

Tað at ynskja sær gagnligastu marknaðaratgongd til ES, uttan at hetta ber í sær grundleggjandi broytingar í viðurskiftum okkara við ES, er at stinga sær sjálvum blár í eyguni. Tí mugu vit eisini fáa tikið hetta álvarsmál upp til politiska viðgerð skjótast.

Kappingarføri okkara er eisini ein trupuleiki, sum vit saman við fakfeløgum og vinnuni eiga at tosað saman um, hvussu hesin trupuleiki kann loysast fólkinum, vinnuni og samfelagnum at gagnið.

Okkara framtíðarstøða - og samstarv v ið ES eigur at verða tikin upp í næstum, og kann byrja við, at ein rástevna verður fyriskipað av løgmansskrivstovuni.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Tað skuldi snúgva seg um álit -men tað endaði við elastikk í meturmál!!

**Tummas í Garði**



At vit í Fólkaflokkinum ikki eru nøgdir við ta samgongu sum spurdist burtur úr býráðsvalinum í Havn er einki at undrast á.

Vit høvdu ov nógv álit á totalt óálítandi persónum - So berini sum vit ikki rukku eru sjálvsagt súr.

Hinvegin má smakkurin hjá sambandsveljarunum hjá Heðini Mortensen, og teimum tjóðveldisveljarum sum verðunliga meina nakað við parolurnar um álit – gjøgnumskygni og opinleika, vera út av lagi ringur!

**"Tað snýr seg um álit"** - varð aftur og aftur at síggja í stórum lýsingum hjá Tjóðveldisflokkinum.

Hvør skuldi hava álit á hvønn??

Skuldi veljarin hava álit á at valevnini vóru so reiðilig og virðilig sum tey søgdu seg at vera – ella var tað bert valevni sum bað um álit frá veljarunum at geva sær atkvøðuna, og so kundu tey annars gloyma alt um álit og reiðiligheit aftaná??

Valnáttin prógvaði, at tað var tað seinna!!

**"Burtur við Jan og Heðin – so verða vit øll fegin"** – stóð við stórum stavum á valplakatum hjá Tjóðveldisflokkinum. Men blekkið var ikki tornað á fyrsta samgonguavtaluni, so høvdu hesir somu valt Heðin til borgarstjóra.

Væl vitandi, at ein stórur partur av teim sokallaðu byggiskandalunum og brotnu byggisamtyktunum sum anstøðan hevur livað høgt uppá seinasta valskeið, júst vóru "uppvask" eftir sama Heðin Mortensen. Álit ?? - Skil tað hvør ið kann!!

Tjóðveldisflokkurin tykist at hava tað við álitinum, sum kendi danski rithøvundurin Sherfig hevði tað við tonnunum: Vanliga tosar man ikki við nakran um sínar egnu tenn - um man ger tað allatíðina, so er tað, tí man hevur trupulleikar.

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður, er jú komin á "skafottið" í flokkinum, tí hann hevur gjørt vart við tað stóra "skisma" sum er ímillum tosi um álit og gjøgnumskygni, og so tað sum verðunliga hendir handan leiktjøldini.

Hetta tosi um álit og gjøgnumskygni hjá Tjóðveldisflokkinum er við Býráðsvalið í Havn, enn einaferð prógva at vera eitt langt elastikk –, men tað kann væl ikki tambast óendaligt – einaferð slitnar tað við eitt brak!!

# Koyr bara – og fá bót

**Kári Olsen**

Líka síðan Vágatunnilin lat upp fyri ferðslu hevur "ómannaða" gjaldsstøðin virkað so illa at at hon altíð hevur verið manna.

MEN, nú er alt nógv betri. Nú kanst tú bert koyra uttan at steðga við nakra gjaldsstøð — tú fært rokningina sendandi. Snilt, snilt.

Eg eri ikki ein av teimum, ið dagliga nýta Vágatunnilin, men koyrdi gjøgnum tunnilin 3. november í ár. Gjaldsstøðin, har ein fyrr skuldi koyra inn og trýsta á ein knøtt fyri at fáa eina rokning — væl hjálptur av í minsta lagi einum vaktarfólki — var nú sperrað av og boðað varð frá við stórum skelti og stórum stavum at nú skuldi ein bert koyra víðari. Hetta geri eg so við góðari samvitsku og í góðari trúgv — væl vitandi at hetta er eisini einasti møguleikin fyri at náa yvir á Streymoynna aftur.

Tríggjar dagar seinni fái eg rokning sendandi. Á rokningini, ið er eitt málsligt misfostur og ein vavstur av føroyskum, norskum, íslendskum og donskum, stendur við stórari skrift: **"Ólóglig koyring um bummstøð"**. Rokningin ljóðar uppá kr. 180,- + kr 400,- í eykagjaldi, tilsamans kr. 580,-. Ikki nokk við tí, men á rokningini stendur eisini at "Verður ikki goldið rættstundis, verða kr. 100,00 lagdar afturat eykagjaldinum."

Á eini etikett. ið er klistra á rokningina, stendur við stórum reyðum stavum, at "Verður upphæddin goldin alt fyri eitt, kunnu tygum síggja burtur frá eykagjaldinum hesaferð". Við øðrum orðum - tú skalt bara váða tær at gera hetta aftur.

Eg fái eisini at vita at eg skal upplýsa kundaeyðkenni, tá goldið verður. Hetta er í mínum føri 36000000000300000282713. Ikki júst eitt tal ein gongur við í høvdinum.

Ætlan mín var bert at senda ein teldupost til P/F Vágatunnilin, men fann onga telduposttilskrift nakra staðni — hvørki á heimasíðuni, Gulu Síðunum ella aðrastaðni. Hví eitt nýtt virkið við fínari heimasíðu ikki ynskir at upplýsa eina telduposttilskrift, kann ein gera sínar egnu metingar um.

Eg eri annars vanur við at gjalda rokningar rættstundis og var tí ikki júst fegin um at fáa eina rokning við eykagjaldi fyri ólógliga gjøgnumkoyring. Eg loyvi mær eisini at ivast í, um Vágatunnilin hevur lógina aftan fyri seg, tá teir hótta fólk við eykagjaldi á henda hátt.

Spyrji eisini meg sjálvan, hví ein ikki bara sendir eina vanliga rokning og síðandi sendir ein rykkjara seinni, um rokningin ikki verður goldin rættstundis. Hetta er vanlig mannagongd aðrastaðni og burdi eisini verið ein góð loysn sæð gjøgnum brillurnar hjá nevndarformanninum/Postverksstjóranum: jú fleiri send brøv, jú fleiri pengar í kassan hjá Postverkinum.

Eg vil heita á manningina aftanfyri P/F Vágatunnilin um at taka sær um reiggj og hugsa seg eitt sindur betri um í framtíðini — og ikki minst: at nýta vanligan fólkasið í samskiftinum við viðskiftafólk.



# Smyril Line og Fjord Line stovna felags rutufelag

**P/F Smyril Line og Fjord Line AS hava gjørt eina avtalu um at stovna eitt felags rutufelag, North Atlantic Lines AS, sum skal samskipa ferjuvirksemið hjá feløgunum**

**SMYRIL LINE**
*Tíðindaskriv*

P/F Smyril Line og Fjord Line AS eru samd um at stovna eitt nýtt felag, North Atlantic Lines AS, sum skal samskipa ferjuvirksemið hjá feløgunum.

Smyril Line og Fjord Line eru í eini avtalu - Memorandum of Understanding - vorðin samd um, at North Atlantic Lines, skal hava ábyrgdina av øllum felags virksemi, sum feløgini nú í felag skulu áseta.

Partarnir eru samdir um, at Smyril Line heldur fram sum sjálvstøðugt felag, og at Smyril Line og Fjord Line halda fram sum merkjanøvn. Tað er eisini semja um, at ognarviðurskiftini kring skipini verða sum í dag, og at North Atlantic Lines leigar skipini frá ávikavist Smyril Line, Fjord Line og øðrum feløgum.

Nýggja felagið fer sambært leiguavtalum at ráða yvir skipunum og nýta tey á teimum rutum, har tað er mest gagnligt og inntøkugevandi.

North Atlantic Lines fær ein haldgóðan, búskaparligan pall at standa á.

Ein stýringarbólkur við fýra umboðum úr Fjord Line og fýra úr Smyril Line skal útgreina, hvussu nýggja felagið best nýtir allan flotan, og hvat virksemi skal liggja í nýggja felagnum. Stýringarbólkurin skal herundir lýsa og skjóta upp útreiðsluminkandi, umsitingarligar bygnaðir, og bólkurin skal greiða úr hondum sína endaligu frágreiðing um hálvan desember 2004.

# Opið bræv

***Til:***
***Harra Bjørn Kalsø, fiskimálaráðharri***
***Harra Henrik Old, formaður í vinnunevnd løgtingsins***

**Sigfríður Jørgensen**
*útróðrarmaður*

Ein dagin mær var lítandi út á hav - brim var, og útnyrðingurin var harður og eingin útróðrardagur - kom mær í hug, at har úti eru menn, ið liggja bakk og vinna sær fulla inntøku meðan útróðrarmaðurin er við sviðið soð. Ikki hevði mær hóvað at skrivað hetta bræv, visti eg, at hesir menn høvdu somu inntøku sum eg. Men og aftur men, eg tali um menn, sum í summum førum hava vunnið sær størstu inntøkur í landinum árliga og sita aðrar dagar og fáa fleirfaldað afturgoldið minstuløn í mun til okkum útróðrarmenn.

Í okkara landi verður so ofta reypað um samhaldsfesti. Eg spyrji bara, hvar er samhaldsfesti her. Hví skal ein útróðrarmaður verða revsaður av tí almenna, tá ið ræður um minstaforvinning í mun til minstuløn hjá tí vælbjargaða fiskimanninum í størri skipum. Útróðrarmaðurin kann veita samfelagnum feskan og væl haggreiddan eindaga gamlan fisk, meðan tíggjudaga gamli ræsti fiskurin frá størri skipum fær hægri prís og fiskimaðurin har fær munandi størri minstuløn enn útróðrarmaðurin fær minstaforvinning.

Eg fari í hesum brævi so inniliga at heita á myndugleikar landsins um at endurskoða lóggávuna, so at øll fólk, uttan mun til, um tey eru á skipsdekki, umborð á útróðrarbáti ella aðrastaðni fáa somu sømdir - at lata øll fara undir ALS kundi verði vegurin. Fyrst tá fari eg at trúgva uppá, at vit búgva í einum samhaldsfastum landi, har allir skattaborgarar verða viðgjørdir eins.